# Hetta má endur-takast




Ferðafólkini umborð á Norrönu vóru sera fegin um jólatúrin til Aberdeen.

Semja er um, at ein slíkur túrur eigur at verða gjørdur aftur.

Tann stóra undirtøkan – eini 1000 fólk – prógvar eisini, at Smyril Line hevur rakt plett við hesum túrinum.

Tí eru fólk sera spent eftir at frætta, um túrurin verður gjørdur aftur næstu jól!

# - Mest fyri at slappa av

**Flestu ferðafólkini umborð vóru ungdómar. Men eisini fólk uppi í árunum vóru við á túrinum til Aberdeen**

JÓLATÚRUR
*Snorri Brend*

Tey flestu ætlaðu helst at gera tað stóra jólainnkeypið í Aberdeen. Men tað vóru kortini tey, sum ikki vóru farin við bara til hetta.

Seinnapartin henda dagin, tá Norröna kom aftur á Havnina, sótu hjúnini Frígerð og Elias Egholm úr Havn og prátaðu saman um túrin.

Tey vóru samd um, at hetta hevði verið eina sera góður túrur, ikki minst tí at veðrið var til vildar allatíðina.

Vit duga so einki negativt at síggja við hesum túrinum. Og tí høvdu vit fegin farið á ein slíkan túr eina ferð aftrat, søgdu tey bæði við ein munn.

Saman við 1000 øðrum fólkum vóru tey við á hesum fyrsta jólainnkeypstúrinum í Aberdeen við Norrönu.

Teimum dámdi eisini sera væl at vera í landi.

- Tað var sera gott at kunna hitta fólkið her. Eg haldi, at vit kundu lært eitt sindur av teimum við at verið meiri hoflig, sigur Elias.

## Alt gott

Hjúnini Egholm vóru fyrst og fremst farin á túrin fyri at slappa av.

Nei, vit hava sjálvi ikki handlað so nógv, siga tey.

Saman við familjuni vóru tey m.a. við øðrum ferðafólkum á einum frálíkum busstúri inn í landið, har vitjað m.a. varð á staðnum har Baxter-vørurnar koma.

Annars hevur tað verið sera hugnaligt at sigla við Norrönu. Og vit mugu bara siga, at betjeningin umborð hevur verið sera góð og maturin eisini, siga tey bæði.

Hóast hetta er fyrsta ferðin hjá Norrönu í Aberdeen á jólatúri, so er tað ikki fyrstu ferð at Elias hevur verið í Skotlandi.

Fyrstu ferð hann var í Skotlandi var fyri sløkum 60 árum síðani. Hetta var kortini fyrstu ferð at Frígerð var í Onglandi, men hon hevur hinvegin verið í so nógvum øðrum londum.

## Gamlar gøtur

Sum smádrongur slapp Elias við eini slupp hagar í 1946.

Hetta var beint eftir krígslok, og tá lógu stórir partar av Aberdeen í sori.

Ja, tað var ikki so hugaligt at ganga í býnum tá. Alt var bumbað sundur og saman, sigur Elias.

Fimm ár seinni var hann aftur í Aberdeen, men tá var býurin bert partvíst bygdur upp aftur.

Ongland var fátækt, men eg haldi at Skotland mundi vera enn fátækari tá í tíðini. Tí tók tað eisini so langa tíð at endurreisa landið, sigur hann.

Nú – í 2005 – var hann so aftur á sama staði, og kundi nú síggja og uppliva at alt var øðrvísi.

Elias kundi snøgt bara staðfesta, at hann kendi lítið aftur av tí, hann nú sá á ferðini.

- Jú her var veruliga nógv broytt, sigur hann.




*Tey flestu fóru helst til handils í Aberdeen, og her var væl at fá*



*Elias og Frígerð Egholm úr Havn dámdu væl túrin. – Alt er gott umborð, siga tey*